# Møtir verða aftur á Oyrarbakka

**Saman við øðrum góðum fólki ætlar Thomas Juul Askham at skipa fyri regluligum møtum í eydnuni á Oyrarbakka. Fyrstu ferð verður nú sunnukvøldið**

MØTIR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Eydnan á Oyrarbakka verður nú karmur um andalig tiltøk í framtíðini*

**Oyrarbakki:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við hesi ætlanini, og avgerð er nú tikin um, at hava møtir í bygninginum 1. og 3. sunnudag í hvørjum mánaði.

Tað eru leikfólk sum koma at hava ábyrgdina fyri hesum møtunum, og hava tey øll verið virkin í karismatisku vekingini sum fór yvir landið fyri 20-30 árum síðani.

Heitið á hesum møtum var Kristus er svarið, og sambært stigtakarunum er hann tað framvegis.

- Møtini í Eydnuni eru ætlað sum eitt tilboð til tey fólkini, sum búgva í Svínáum, Norðskála, Oyrarbakka og á Oyri. Men onnur eru sjálvandi eisini vælkomin á møtini, sigur Thomas Juul Askham.

Sagt verður, at tey virða tað andaliga arbeiðið sum er á teimum ymisku støðunum, men ynskja bert at bjóða teimum til Guds orð.

Fyrsta møtið verður sum nevnt sunnukvøldið kl. 18, og tá verður luttøka av Hjalgrím Davidsen, Valdimar Simonsen og Thomas Juul Askham. Magda og Maibritt fara at syngja við hetta møtið.

Ætlanin er sum nevnt at hava hesi møtini 1. og 3. sunnudag í hvørjum mánaði. Henda fyrsta mánaðin verða tó møtir hvørt sunnukvøld við luttøku av talarum og sangkreftum kring alt landið.

Ein faldari er gjørdur í hesum sambandi, og er býttur út til øll húski í økinum.





# Mykines ikki snikkaleys

**Í Mykinesi, eins og runt ymsa aðra staðni, merktu tey til nógva vindin seinasta hóskvøld**

Summar bygdir fingu av at vita, so sum vit hava bæði hoyrt og sæð seinastu vikuna, men fleiri staðni eru skaðar hendir, sum vit ikki hava hoyrt um.

Í Mykinesi var eisini nógvur vindur og nakrir skaðar stóðust av hesum. Fyri tað mesta vóru tað úthús sum stóðu fyri skotum, men eisini onkrir aðrir skaðar vóru eisini.

Hesar myndirnar av skaðum í Mykinesi hevur Kjell Nattestad tikið.

-leo




BØRN OG STRONGD

- vit seta fokus á børn og strongd, ein alsamt vaksandi trupulleiki

**Strongd er ikki nakað**, vit vaksnu hava einkarrætt uppá. Børnini eru tíverri væl við, og øll børn kunnu verða trýst út í støður, sum gera, at tey gerast strongd. Summi eru tó í størri vanda, enn onnur. Eitt nú børn, har foreldrini fara hvør til sítt, serliga um samskiftið millum foreldrini er vánaligt. Jú betur vit kenna tekin uppá strongd, jú skjótari kunnu vit hjálpa og harvið minka um trupulleikan, áðrenn hann gerst ov stórur.

**Skeiðsleiðararnir** fara at seta fokus á, hvat strongd er, hvørji tekin vit serliga skulu vera varug við og hvussu strongd ávirkar børn okkara.

**Á skeiðnum verður** m.a. arbeitt við konkreta arbeiðsamboðnum "mestringsirklen". Hetta amboðið kann brúkast sum ein hjálp til at vísa á, hvussu man hjálpir børnunum best í pedagogiska arbeiðinum. Hugt verður eisini at, hvat fakfólk, saman við foreldrum, kunnu gera, fyri at fáa børnini at trívast og støðugt menna teirra mótstøðukraft móti strongd.

**Skeiðið vendir sær til fólk**, sum arbeiða við børnum. Starvsfólk á dagstovnum og frítíðarskúlum, pedagogar og hjálparfólk, lærarar, dagrøktarar, sjúkrarøktarfrøðingar, sálarfrøðingar, fosturforeldur, barnaverndarlimir og starvsfólk innan umsiting á sosialum deildum.

**Lisbeth Lencher-Hübertz og Lene Ditte Bjerring Bagger**, sum báðar hava arbeitt á barnadeildini á Hillerød Sygehus í nógv ár, fara at undirvísa. Umframt nógvar praktiskar royndir, hava tær arbeitt við granskingarverkætlanum og verið við til at skriva bókina "Når børn får stress". Í 2008 kemur bókin "Vi arbejder med forældresamarbejde" út.

**Tilmeldingarfreist:** So leingi pláss eru eftir.

**Les meira og tekna teg** á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464).

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn
Tel. 22RING (227464) - Fax. 32BELL (322355)
www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - skype: synergi-asa